# Fiskimannafelagið tapti



*Arctic Viking hevur seinastu árini havt útlendingar við. Fiskimannafelagið vildi hava teir hildnar uttanfyri, tá ið býtispartarnir vóru ásettir, men tað segði landsrætturin nei til*

**Grundreglan í sáttmálanum millum Føroya Fiskimannafelag og Føroya Reiðarafelag er at býta javnt millum allar menninar umborð á skipi, sigur Eystari Landsrættur, sum eins og Føroya rættur frídømdi reiðaríið hjá Arctic Viking fyri at hava talt útlendingarnar við, tá ið hýrurnar vórðu roknaðar út**

EYSTARI LANDSRÆTTUR
*Randi Jacobsen*
*randi@sosialurin.fo*

Í morgun feldi Eystari landsrættur dóm í málinum millum Føroya Fiskimannafelag og reiðaríið hjá rækjutrolaranum Arctic Viking. Dómurin var tann sami sum í Føroya rætti. Reiðaríið varð frídømt fyri at hava talt útlendingarnar við, tá ið býtispartarnir vórðu ásettir.

Fiskimannafelagið stevndi reiðaríinum P/F Líðini fyri at hava talt seks litavar uppí, tá ið býtisparturin varð roknaður út. Fiskimannafelagið helt, at føroysku fiskimenninir harvi høvdu fingi ov lítið og kravdi 1,4 mió. krónur til menninar.

Føroya Fiskimannafelag tapti í Føroya rætti og kærdi dómin til Eystara landsrætt.

Grundgevingin hjá Føroya Fiskimannafelag fyri at stevna var, at litavarnir ikki vóru mynstraðir, og haraftat verða teir løntir eftir fastari avtalu við reiðaríið. Reiðaríið átti sjálvt at havt allar útreiðslurnar av útlendingunum, segði Føroya Fiskimannafelag.

## Sama arbeiði

P/F Líðin hinvegin vísti á, at útlendingarnir umborð gjørdu sama arbeiði sum føroyingarnir, og um teir seks útlendingarnir í staðin vóru føroyingar, høvdu føroyingarnir ikki fingið meira.

At útlendingarnir fáa minni hýru útgoldna enn føroyingarnir, kemur ikki Føroya Fiskimannafelag við, segði sakførarin hjá P/F Líðini í rættinum.

Høvuðsvitnið hjá reiðaríinum var fyrrverandi formaðurin í Føroya Fiskimannafelag, Oli Jacobsen. Hann kom við grundregluni í sáttmálanum um at býta javnt millum allar menninar umborð. Henda regla kom í sáttmálan í 1971.

Hann var ikki í iva um, at sáttmálin skuldi tulkast sum, at býtast kuldi javnt, eisini við útlendingarnar.

Hesi tulking tóku bæði Føroya rættur og Eystari landsrættur undir við, og eins og í Føroya rætti varð Líðin frídømd í landsrættinum.

Hetta málið hevur verið ein dýr søga fyri Føroya Fiskimannafelag. Sakførarin hjá reiðaríinum skal hava 50.000 kronur fyri landsrættarmálið og 60.000 krónur fyri rættarmálið í Føroya rætti. Haraftrat koma útreislurnar til egnan sakførara.

## Fegin reiðari

Reiðarin og sakførari hansara Jógvan Elias Winther Poulsen eru fegnir:

– Vit eru glaðir fyri, at dómurin varð staðfestur. Vit hava fingið staðfest, at reiðarin tulkaði sáttmálan rætt, og at meginreglan um at býta javnt er galdandi, sigur Jógvan Elias Winther Poulsen.

Hnan heldur ikki, at nøkur orsøk er til at ilskast inn á reiðaríið fyri at hava seravtalu um hýru við útlendingar. Hevði tað ikki verið, hevði skipið óivað farið undir hamaran.

ÚTBJÓÐING

Rituvíkarvegurin, byggistig 2

Við hesum verður arbeiðið viðv. nýggjum vegi oman fyri Rituvíkarbygd, byggistig 2, boðið út í almenna lisitatión.

Arbeiðið fevnir í høvuðsheitum um:
· liðugtgerð av landsvegi frá Rituvíkarhálsi og oman í bygdina uml. 1230 m
· liðugtgerð av nýggjum bygdarvegi frá Rituvíkarhálsi og oman í verandi bygdarveg uml. 250 m
· dagføring av Æðuvíkarvegnum uml. 70 m
· tríggjar vegristir
· tvær seyðasmogur, hvar onnur er í verandi bygdarvegi
· umframt vegagerðina fevnir arbeiðið eisini um veitan og uppsetan av gøtuljósum

Lisitatiónin verður á Landsverki, Tinghúsvegur 5, FO-110 Tórshavn

týsdagin 20. apríl 2010, kl. 14.00.

Útbjóðingartilfarið verður bert útflýggjað digitalt og verður tað sent út mánadagin 29.03.2010. Bjóðandi kunnu fáa tað við skrivliga at venda sær til:

Landsverk,
Tinghúsvegur 5,
Postsmoga 78,
Fo-110 Tórshavn.
Telefon: 340 800
boha@lv.fo

Tá biðið verður um útbjóðingartilfar skal upplýsast:

· Navn á virki, adressa og vinnutal
· Kontaktpersónur og telefonnummar hjá kontaktpersóni
· Teldupostadressa

Spurningar í samband við prosjektið kunnu sendast skrivliga til boha@lv.fo fram til fríggjadagin 09.04.2010. Innkomnir spurningar verða svaraðir í seinasta lagi týsdagin 13. apríl,.2010.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er ein stovnur undir Vinnumálaráðnum, og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*



Stjóri til P/F Fresh Link

**P/F FRESH LINK** á Toftum søkir við hesum eftir stjóra. Fresh Link er ein fyritøka, ið er fíggjarliga og fyrisitingarliga væl fyri.

Fresh Link varð stovnað í 2008 og fæst við farmaflutning millum Føroyar og Evropa. Farmaskipið Silver Fjord siglir 2 ferðir um vikuna millum Toftir og Skotland.

Samskiftisavtalur eru viðv. farmaflutningi í Evropa og Føroyum, ið gera tað møguligt at fyta allar mongdir av frakt beinleiðis til tey einkultu viðskiftafólkini.

Størsti parturin av farmaflutninginum hjá felagnum er feskur fiskur úr Føroyum, men innflutningurin av vørum til smá- og heilsølur í Føroyum er nógv øktur, síðani felagið byrjaði virksemi sítt.

Stjórin kemur, umframt dagligu fyrisitingina, í tøttum samstarvi við nevnd felagsins, at vera við til at:
1. Menna fyritøkuna bæði innan- og uttanlands.
2. Finna nýggj handilstilknýti bæði innan- og uttanlands.

Ongar serligar treytir verða settar til útbúgving, men vit vænta, at tú hevur drúgvar royndir í vinnulívinum og hevur góð úrslit at vísa á, í starvinum tú kemur frá. Av tí at fyritøkan arbeiðir í einum altjóða umhvørvi er neyðugt at kunna samskifta á enskum máli, bæði í skrift og talu.

Lønin verður ásett eftir avtalu og er á einum kappingarførum stigi.

Meiri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Fróða Sivertsen, statsaut. revisor, Sp/f Grannskoðaravirkið Inpact. tlf. nr. 794725 ella teldupost fs@inpact.fo

Allar umsóknir og fyrispurningar til starvið verða viðgjørdar í trúnaði.

*Freistin at søkja starvið er 14. apríl 2010*

Umsóknir skulu sendast til.
**Sp/f Grannskoðaravirkið INPACT**
løggilt grannskoðaravirki
R.C. Effersøesgøta 26
Postboks 191
100 Tórshavn
Stílað: Fróði Sivertsen
Stjóri til P/F Fresh Link